# Veðrar á fitilendi á Kunoynni

**Í fimm ár út í eitt nú, hava nakrir mans havt veðrar gangandi á fitilendi á Kunoynni. Lendini, talan er um, eru Hvannrók og Skarðstør. Væl hevur royndst øll árini. Í meðal hava teir havt 1o veðrar, og meðalvektin hevur ligið um tey 70 pundini**



*Tá farið verður til Skarðstør, verður farið við báti, tí ikki er gangandi til lendið úr haganum*

HEYSTPRÁT
*Solby A. Eliasen*

Fyri stuttum vóru menn eftir veðrunum, sum hava gingið á fitilendunum Skarðstør og Hvannrók á Kunoynni. Talan er um 10 veðrar, sum eru flettir. Tveir brundir og so nakað av smáum afturat. Brundirnir vigaðu 78 og 80 pund, meðan vektin á hinum lá ímillum 53 og 66 pund.

Hans Pauli Purkhús sigur, at árið í ár royndist eitt sindur verri enn undanfarin, men tað helst kemst av, at fyri uttan báðar brundirnar, so var tað fyri tað mesta sovorðið smátt, sum teir sleptu upp í mei mánaða.

– Í meðal hava vit tíggju veðrar um árið, og vektin hevur ligið um tey 70 pundini, so vit kunnu ikki annað enn vera sera vælnøgdir, sigur hann.

Hans Pauli er ein av fýra monnum, sum fyri fyrstu ferð í mong ár, var við til at koyra fýra heystlomb upp í 1991. Hetta var bert nakað sum teir funnu uppá, tí lendini ikki hava verið nýtt síðan í sjeytiárunum. Tað vísti seg at roynast avbera væl, men tað bleiv so ikki til meira enn tað eina árið tá, kortini.

Men so gingu nøkur ár, og eigaraviðurskiftini á Skarði vórðu broytt, og nú hava teir verið í Skarðstør fimta árið á rað.

Hvannrók liggur sera ovarlaga á Kunoynni, einar 400 til 500 metrar, Kunoyar meðna Nakkinum, meðan Skarðstør, sum liggur einar 100 metrar uppi, hoyrir til hagapartin fyri uttan á Skarði. Hans Pauli og hinir leiga lendi frá teimum. Og teir hava tað fyribils í tvey ár afturat.

– Tað er áhugin, sum drívur verkið, sigur Hans Pauli og leggur afturat, at tað er áhugavert at síggja, hvussu nógv seyðurin fer fram ta tíðina, hann gongur á fitilendi.

Teir hava onkuntíð roynt at viga seyðin, áðrenn hann verður koyrdur upp, men seinastu árini hava teir heldur vigað hann beint áðrenn og aftaná flettingina. Og tað hevur royndst sera væl. Krovsvektin hevur ligið um 48 %.

Hans Pauli sigur, at seyðurin etur lítið, men at føðin er so mikið góð, og tað er orsøkin til, at krovini eru so góð.

– Seyðurin hevur lítla vomb, men nógv er uppiá.

### Hvannrók og Skarðstør

Teir fýra, sum av fyrstan tíð byrjaðu at koyra seyð upp á Hvannrók og Skarðstør, eru Hans Pauli Purkhús, Jógvan Pauli í Kongsstovu, Jógvan Mørkøre og Hans Jacobsen. Hesin seinasti er búsitandi í Danmark, men enn hevur hann ikki latið nakað heystfjall farið framvið, uttan at hann er heima.

Teir plaga at koyra um tíggju seyðir upp á Skarðstør, meðan á Hvannrók, sum er eitt lítið lendi, verða bert tveir seyðir sleptir.

Hans Pauli sigur, at einaferð koyrdu teir 12 seyðir upp á Skarðstør, men tá kom ein ikki afturíaftur.

Tá farið verður til Skarðstør verður farið við báti, meðan til Hvannrók er gangandi frá haganum av. So verður seyðurin loraður bæði upp og niður.

Seyðurin, sum gongur í Skarðstør verður koyrdur upp eitt sindur fyrr enn á Hvannrók. Tað kemur av, at Hvannrók er so ovarlaga og gróðurin tí kemur seinni í har.

Tað var óhøgligt at ganga har, men teir hava betrað munandi um umstøðurnar at ganga árini, teir hava verið har.

Í fjør royndu teir eitt triðja fitilendi á Kunoynni, tað kallast í Seyðbergi, men Hans Pauli sigur, at tað var so óhøgligt, at dagurin strekti ikki til, so avgjørt var ikki at fara aftur hagar.

Hesi bæði fitilendini vórðu nýtt sera nógv inntil í sjeyti árunum. Tá kom stígur í, og ongin hevði seyð gangandi har, líka til Hans Pauli og hinir sleptu teimum fýra heystlombunum upp í 1991.

Nú standa so heystfjøllini fyri durum, og Hans Pauli sigur, at nú verður farið at ganga tey fyrstu fjøllini á Kunoynni.

Kunoyggin hevur verið eyðkend fyri, at nógv fjøll hava verið at ganga, men í ár rokna menn við, at tað verður øðrvísi, tí alt bleiv ummatrikkulerað í fjør. Tað var alt so spjatt áðrenn, men nú eigur ein í einum hagaparti, og tað ger sítt til, at tað ikki nýtist at vera sama fólki til hvørja gongu. Tí fer tað at bera til at ganga fleiri fjøll sama dag í Kunoy í ár. Og tað skuldi gjørt alt munandi lættari.

Hans Pauli sigur, at enn hava teir ikki gingið nakað fjall, men at lombini síggja gott út í haganum.

– So fáa vit at síggja, hvussu fer at roynast, sigur hann at enda.



*Á myndini síggjast Jógvan Mørkøre og Hans Pauli Purkhús. Her seta teir stikir fastar í klettin*

*Mynd: BAF*

# Lastbilur út av vegnum

**Fríggjadagin um eitt tíðina fór ein lastbilur hjá Elmari Zachariassen út av Viðareiðisvegnum**



*Fríggjadagin um eitt tíðina koppaði ein bilur hjá Elmari Zachariassen á Viðareiðisvegnum. Ongin álvarsligur skaði hendi*

ÓHAPP
*Solby A. Eliasen*

Óhappið hendi beint áðrenn Leitisbrekkuna á Viðareiðisvegnum. Bilurin var júst komin norður aftur fult lessaður av asfalti.

Bilførarin greiðir frá, at hann bakkaði inn á eitt víkipláss, tí hann skuldi venda bilinum, so hann kundi bakka til útleggjaran.

– Eg bakkaði inn á víkiplássi og vendi ov tíðliga, so lendið skrædnaði undan bilinum, og so koppaði hann. Tað er í stuttum tað, sum hendi, greiðir bilførarin frá.

Beinanvegin komu fólk at hjálpa til, og tað gekk bæði skjótt og væl at fáa bilin uppaftur.

Ongin fólkaskaði hendi, og bilurin kundi koyra aftur longu hálvan tíma eftir óhappið.



# Semja um fibur

**Føroya Tele, Kall og Fjarskiftiseftirlitið eru vorðin samd um, at Kall í framtíðini kann nýta sokallað svartfibur hjá Føroya Tele**



*Kervi hjá Føroya Tele kann Kall so at siga fult út nýta, eftir at flestu avtalurnar eru komnar uppá pláss.*

FJARSKIFTI
*Heri á Rógvi*

Eftir drúgt stríð tykist nú semja at vera millum Føroya Tele, Fjarskiftiseftirlitið og Kall. Partarnir hava í allar flestu førum verið púra ósamdir, og neyðugt hevur verið við skarpari semju.

Í seinastu støðisuppgerðini hjá Fjarskiftiseftirlitinum, hin 23. august 2002, stendur at lesa, at semjan nú er gjørd á kalla øllum økjum.

Millum annað er gjørd semja um fipur. Hetta merkir, at Kall nú kann leiga fipur kaðal. Hetta gevur ómetaliga stóran kapasitet, og tað kann fáa týdning í fluttningi av data. Sum heild hevur Kall nú fingið so gott sum allar avtalur, ið viðvíkja Føroya Tele og teirra kervi uppá pláss.

Vit prenta støðuuppgerðina niðanfyri. Støðuuppgerðin vísir avtalur um atgeingi til kervi hjá Føroya Tele.

1. Sambinding av internetryggum / atgeingi til altjóða internetið.

Vinnumálaráðið setti saman við KT-felagum í gongd verkætlan nevnd THOR-IX. THOR-IX er ætlaður at tryggja at innanlanda internetferðsla verður umskift ókeypis í landinum og ikki tyngir tann avmarkaða uttanlanda kapasitetin. Tað dróg út at fáa depilin at virka, men virkar hann nú og ferðslan er í støðugum vøkstri.

2. Koblaður samflutningur. Prísirnir eru endurskoðaðir seinast í avgerð hjá Fjarskiftiseftirlitinum frá november 2001. Møguliga verða prísirnir endurskoðaðir í heyst.

3. Fast forskoyti og forskoyti.

4. Innanlanda- og uttanlandaleigulinjur. Prísirnir fyri innanlanda leigulinjur eru til viðgerðar og verða væntandi endurskoðaðir.

5. Atgeingi til kaðalstøðina í Tjørnuvík, bæði sum partur av einum heildartilboðið Føroyar - Danmark og sum backhaul. Prísurin var endurskoðaður í nov. 2001, men kærdi FT avgerðina til kærunevndina í fjarskiftismálum, og tók FSE í mai 2002 avgerð aftur til nýggja viðgerð, vegna at nýggir upplýsingum í málinum. Málið verður væntandi avgreitt í sept. 2002.

6. Samhýsing – mastrar/hús. Føroya Tele hevur ein standardsáttmála, ið verður brúktur m.a av Rás2. FSE skilir at arbeitt verður við betri gjøgnumskygni var viðv. húsum / mastrum í samogn millum FL / FT.

7. Tænastuavtala fastnet. Fjarskiftiseftirlitið tók 21. februar 2001 avgerð um at Føroya Tele skal taka upp samráðingar um eina tænastuavtalu um fastnet, soleiðis at annar veitari kann krevja inn fasta haldið vegna kundan og soleiðis veita eina heildar fastnetstænastu til kundan. Kall lat fyri jól eitt liðugt uppskot til avtalu. Kall bað í mars 2002 Fjarskiftiseftirlitið um at royna seming í málinum. Semingstilfongdin endaði við at partarnir, uttan um FSE, gjørdu semju í mai 2002.

8. Svart fipur. Kall bað á sumri 2001 um atgeingi til langtíðarleigu av svørtum fipri. Kall bað um seming í des. 2001. FSE royndi seming í málinum og endaði málið við semju millum partarnar og var sáttmáli undirskrivaður 19. august 2002.

9. Innanlanda reiking innan fartelefoni GSM. Samráðingar vóru millum FT og Kall á heysti 2001 um sáttmála, men uttan úrslit. Í vár bað Kall um seming og endaði málið við semju millum partarnar og undirskrivaðu partarnir 23. august 2002 undir sáttmála.

10. Rátt kopar atgeingi (shared access). Føroya Tele hevur latið útgreinað tilfar um tal av koparlinjum v.m. í 6 býum. Kall hevur í 2001 biðið um atgeingi, men samráðingarnar eru ikki byrjaðar. Kall ferð í næstum at senda FT uppskot til sáttmála. Málið er ikki lagt fyri FSE.

# Slóðbrótandi norsk avtala um sjúkrafráveru

**Sjúkrafrávera: Markið millum at vera sjúkur og frískur er broytt í Norra í einari nýggjari avtalu, sum skal steðga tí høgu sjúkrafráveruni hjá norðmonnum**

TÍÐINDASKRIV
Vinnuhúsið

Ein trípartaavtala í Norra hevur munandi broytt um hugtøkini at vera sjúkur og frískur. Síðani 1. juli í ár hava persónar, sum verða sjúkir, skyldu til, eftir samtalu við egnan lækna, at upplýsa fyri arbeiðsgevaranum, hvørjar uppgávur tey kunna og ikki kunna útinna orsakað av sjúkuni. Hetta skal gera tað møguligt hjá fleiri, sum annars vildi verið sjúkrameldað uppá fulla tíð, at halda fram at arbeiða. Málið er at lækka tað høgu norsku sjúkrafráverun við 20% innanfyri 4 ár.

Sjúkrafráveran í Norra er hækkað øgiligt síðan 1994 og er tann hægsta í Norðanlondum. Trípartaavtalan skal venda útviklinginum við m.a. at læknar vera við í einari løgboðaðari metan av, hvørjar uppgávur, starvsfólkini framhaldandi kunnu útinna hóast sjúku.

Avtalan er gjørd millum partarnir á arbeiðsmarknaðinum og stjórnina – og hevur ført til, at lóggávan viðv. sjúkrafráveru og sjúkuboðan er broytt.

### Positiv metan av arbeiðsføri

Sambært teimum nýggju reglunum er sjúkuboðan fyrst gyldug, tá ið læknin og tann sjúki hava greitt teir aktuellu arbeiðsmøguleikarnar hjá persóninum – og upplýst hetta fyri arbeiðsgevaranum. Fáa virkini ikki slíkar upplýsingar og samrøðu við arbeiðstakaran, hava tey í prinsippinum loyvi til at afturhalda sjúkralønina ella sjúkradagpengarnar.

Hetta fer m.a. fram um eina víðkaða læknaváttan, sum skal gera tað møguligt hjá arbeiðsgevaranum at meta um, hvørjar uppgávur starvsfólkið kann gera hóast sína sjúku. Harvið verður latið upp fyri eini meira stig fyri stig afturvendan til arbeiðið, soleiðis at sjúkugongdin og harvið vandin fyri útskúgving verður fyribyrgdur.

Norra er so vítt vit vita tað fyrsta landið, sum brúkar hesa vídtgangandi broyting í hugtøkunum sjúka og frískur í stríðnum ímóti sjúkrafráveru.

Tann danska lóggávan gevur ikki arbeiðsgevarum møguleika fyri at krevja upplýsingar um sjúkueyðkennini hjá starvsfólkunum, og danskir læknar neyvlýsa ikki, hvørjar uppgávur, persónurin kann og ikki kann útinna orsakað av sjúkuni. Danskar læknaváttanir vátta aleina, at talan er um sjúku, og upplýsa, hvussu leingi sjúkan væntandi varar.

### Málið fyri trípartaavtaluni

Tað ítøkiliga málið fyri avtaluni er at minka um sjúkrafráveruna við 20% yvir 4 ár, men umframt hetta hava teir tríggir partarnir bundið hvønnannan til meginregluna, at øll, sum vilja og kunna, skulu hava møguleika fyri at arbeiða. Ítøkiliga skal meginreglan setast í verk við at fáa nógv fleiri við niðursettum arbeiðsevnum út á arbeiðsmarknaðin aftur.

Ein berandi meginregla í avtaluni er eisini, at tað skal gerast enn meira fíggjarliga lokkandi fyri virkini at gera nakað virkið fyri at lækka sjúkrafráveruna. Hetta skal fara fram við, at tað einstaka virkið sjálvboðið ger ein sáttmála við myndugleikarnar um ávís mál, tiltøk og mannagongdir, sum kunnu lækka sjúkrafráveruna. Øvugt so binda myndugleikarnar seg til at stuðla virkunum fíggjarliga og lætta nakað um tað fyrisitingarliga arbeiðnum.

Generelt er tað eisini eitt mál í avtaluni, at tað skjótari verður fylgt uppá sjúkrafráveruna, soleiðis at sloppið verður undan langtíðarfráveru og útskúgving.

# Rætting

Í grein í leygardagsblaðnum um stóra narkomálið við yvirskriftini »Trý ára fongsulsrevsing« eru misvísandi upplýsingar komnir fyri. Tað er í sambandi við revsingina, at tað stendur, at tann dømdi fær avsláttur fyri tíðina, hann sat avbyrgdur. Í sjálvari greinini stendur skrivað, at hann fær ein mánað í avsláttri, men í myndatekstinum stendur eitt ár. Rætta talið er ein mánaður og ikki eitt ár. Hetta er galdandi í Danmark, men ikki í Føroyum, og tann dømdi skal væntandi til Danmarkar at sita revsingina, tí talan er um eitt so drúgt tíðarskeið. Fyri avbyrgingina fær hann væntandi ein mánað avsláttur, t.e. ein dag fyri hvørjar tríggar, hann sat avbyrgdur.

**-HR**